


# Gott tað ikki eru mínir pengar

**- Eg hevði ikki trúð, at marknaðurin var so livandi, at hann kundi broytast so nógv eftir einum degi. Tað sigur ein av luttakarunum í Íløguspælinum, sum Sosialurin hevur tosað við.**

ÍLØGUSPÆLIÐ
*Hilmar Simonsen*

Spenningurin var í hæddini, tá Íløguspælið fór í luftina tann 24. september. Nú tveir og ein hálvan mánað aftaná munnu nógvir luttakarar fegnast um, at tað ikki eru veruligir pengar, spælt verður við. Ein teirra er Birgir Davidsen, sløkkiliðsmaður í Hoyvík.

Sjálvt um fleiri spælarar hava verið so dugnaligir at fáa byrjunarupphæddina at yngla, so eru tað nógv fleiri sum noyðast at smyrja seg við reyðum tølum og eina tódnaða byrjunarupphædd.

Hjá Birgiri Davidsen hevur tað gingið eitt sindur upp og niður, og í løtuni liggur samlaða ognin niðanfyri milliónina, og tað er einki at reypa av, heldur hann. Hann er ein av teimum yvir 4000, sum luttaka í spælinum, og saman við starvsbrøðrum sínum á Brandstøðini er hann eisini í einum bólki, sum kappast innanhýsis.

- Tað gongur einki serligt í løtuni, so eg kann bara vera glaður fyri, at hetta ikki eru mínir egnu pengar, heldur hann læandi fyri.

Hann kennir onkran, sum hevur staðið seg avbera væl í Íløguspælinum, men sambært honum sjálvum er tað fólk við drúgvari royndum innan virðisbrøv, enn hann sjálvur hevur. Áðrenn Birgir meldaði seg til Íløguspælið, kendi hann lítið og einki til partabrøv, men nú er áhugin kveiktur fyri hesum nýggja ítrivi.

- Gongur tað væl, so er sjálvandi stuttligt, men tá tað gongur minni væl, so spyr ein seg sjálvan, hvat ein ger galið. Eg var nakað bráður í byrjanini og handlaði í so dúgliga, men nú havi eg lært, at tað er gott at vera tolin viðhvørt, sigur hann.

**Eitt slag av útbúgving**

Birgir Davidsen heldur, at Íløguspælið er eitt slag av útbúgving. Hetta hóast munur er á hesum og íløgum í veruliga lívinum, tí mekanismurnar við at keypa og selja virðisbrøv eru tær somu. Hinvegin er tað tíðarhorisonturin, sum er avgerandi munurin. Men hvat kann ein so læra av spælinum?

- Eg hevði ikki trúð, at marknaðurin var so livandi, sum hann er. At kursirnir kundu broyast so skjótt, og í summum førum bara eftir lítlari løtu. Tað er ofta ringt at vita, nær ein skal keypa og nær eina skal selja. Tað er uttan iva ein kombinatión av dugnaskapi og hepni, um tað skal eydnast væl, heldur Birgir fyri.

Fyri vanliga føroyingin er handil við virðisbrøvum eitt lutfalsliga nýtt fyribrigdi, og so er eisini hjá Birgiri. Og fyri hann, eins og fyri onnur áhugað, er hetta ein nýggjur møguleiki at parkera sparipengar í veruliga lívinum, men áðrenn ein kemur so langt er tað gott at



fáa eitt sindur av innliti í hendan dynamiska partabrævaheimin. Og her kemur Íløguspælið til sín rætt.

- Eitt av teimum tingum, eg havi lært í hesum spæli er, at tað kann vera vandamikið at handla ov impulsivt. Í einum føri hevði eg keypt partabrøv, sum vóru lækkað nakað nógv, og helt tí at best var at selja. Dagin eftir hækkaðu tey munandi, men tá var ov seint, greiðir hann frá.

At tað hevur gingist minni væl í seinastuni hevur gjørt, at áhugin er fúnaður nakað, men Birgir Davidsen hevur ongar ætlanir um at geva skarvin yvir, fyrr enn spælitíðarskeiðið er at enda komið.

- Eg ætli mær at luttaka til síðsta bríksl. So vóni eg bara, at gongdin fer at venda fyri mítt viðkomandi, sigur hann.

**Virðisbrævamentan kærkomin**

Birgir Davidsen er fegin um, at ein virðisbrævamentan er um at festa røtur í Føroyum. Serliga eru tað føroysku fyritøkurnar, sum hann hevur áhuga fyri. Fyrst var tað Atlantic Petroleum, síðani Føroya Banki og Eik Banki, og í dag, tann 10. desember, kemur Atlantic Airways á børsin. So eru tær 4 í tali.

- Eg haldi, tað er gott, at vanligi føroyingurin fær møguleika at seta pening í heimligar fyritøkur, staðfestir Birgir og sigur víðari:

- Júst tað at føroyskar fyritøkur eru á børsinum ger tað nógv stuttligari at fylgja við gongdini á marknaðunum.

Eitt sum hann kundi hugsað sær er, at tað vóru fleiri skeiðstilboð viðvíkjandi partabrævahandli, tí enn eru tað nógv fólk, sum ikki hava stórtvegis innlit í partabrøv. Men her er Íløguspælið eitt plástur á sárið.

Tí spyrja vit, um Íløguspælið er eitt gott tiltak, sum eigur at vera afturvenandi?

- Ja, tað haldi eg avgjørt, og eg vóni, tað verður afturvendandi. Skuldi eg funnið upp á at gjørt íløgur við egnum pengum, so kenni eg meg eitt sindur betur ílatnan, sigur Birgir Davidsen at enda.

**Kvøld fyri tvey á Gourmet til vikuvinnaran í Íløguspælinum**

**Besti spælarin í viku 49:**
sabjorn

Avkastið hjá vinnaranum hesa vikuna: kr. 308.731,37 (+33,33%)

Vinnarin fær beinleiðis boð.

Hjartaliga tillukku
Kaupthing Bank

**Gongdin hjá topp 3** (vika 49)




**Topp 10** (10. des. 2007 kl. 11.00)

| Leikari | Reiður peningur | Partabrævaogn | Ogn | Avkast |
|---|---|---|---|---|
| navijoe | 3.296.175,18 kr. | 0,00 kr. | 3.296.175,18 kr. | +229,62 % |
| TNT | 1.630.231,20 kr. | 0,00 kr. | 1.630.231,20 kr. | +63,02 % |
| Raggyboy | 422,92 kr. | 1.600.027,00 kr. | 1.600.449,92 kr. | +60,04 % |
| Stavnur | 459,07 kr. | 1.570.272,00 kr. | 1.570.731,07 kr. | +57,07 % |
| hps | 42.101,00 kr. | 1.489.577,34 kr. | 1.531.678,34 kr. | +53,17 % |
| Mazda323 | 712.228,50 kr. | 818.598,66 kr. | 1.530.827,16 kr. | +53,08 % |
| hanna21 | 405.515,57 kr. | 1.123.436,00 kr. | 1.528.951,57 kr. | +52,90 % |
| Mr_Arge | 396,03 kr. | 1.491.726,79 kr. | 1.492.122,83 kr. | +49,21 % |
| MMilogur | 570,00 kr. | 1.466.300,00 kr. | 1.466.870,00 kr. | +46,69 % |
| Ranir | 161.836,07 kr. | 1.305.000,00 kr. | 1.466.836,07 kr. | +46,68 % |